


www.oljan.fo

**Jan Müller** 12 - 01 - 2012

# Stórur áhugi fyri Føroyum á oljuráðstevnu

Í desember varð sáttmáli undirskrivaður ímillum TGS-NOPEC og Jarðfeingi á oljuráðstevnuni Prospex í London. Tænastuveitarafelagið TGS-NOPEC arbeiðir í løtuni við endurviðgerð av seismiskum dátum á Føroyaøkinum, og tann nýggi sáttmálin umfatar endurviðgerð av føroyskum boridátum skrivar heimasíðan www.jardfeingi.fo. Við á ráðstevnu Í desember luttók Jarðfeingi á ráðstevnu í London. Hetta er ein árlig ráðstevna har oljufeløg hava møguleika at selja leitimið, tænastuveitarafeløg møguleika at selja tænastur til oljuvinnuna, og umboð fyri almennar oljumynduleikar í ymiskum londum hava møguleika at vísa á áhugaverd umráði á teirra øki. Jarðfeingi var umboðað á ráðstevnuni við bási og fyrilestri, har víst varð á møguleikar á tí føroyska økinum. Heri Ziska, jarðfrøðingur, helt fyrilestur um gongdina á økinum hesa seinastu tíðina, og áhugin fyri Føroyum hevur verið stórur skrivar Jarðfeingi á heimasíðu sínari. Samstundis hava TGS-NOPEC, sum í dag arbeiðir við endurviðgerð av stórum parti av tí seismikki, ið er á føroyska økinum, og Jarðfeingi undirskrivað enn ein sáttmála. Sambært nýggja sáttmálanum skal hetta tænastuveitarafelagið endurviðgera føroyskar boridátur. Úrslit í ár Úrslitið av hesum báðum endurviðgerðum kemur vónandi at geva áhugaðum nógva nýggja vitan um tað føroyska økið. Nýggju seismisku dáturnar verða klárar fyrst í 2012, meðan boridáturnar væntandi verða klárar seinni í 2012 skrivar Jarðfeingi. Myndir - Heri Ziska frá Jarðfeingi á føroyska básinum í London. Mynd - Jarðfeingi.